FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
NOVEMBER - DESEMBER 2005
SKRIVLIG FRAMSETING

FØROYSKT

4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 At undrast og spyrja
2 Fjølmiðlar
3 Ungdómur og sorg
4 „Har, tú ikki ert sjálvur, ert tú ikki meir enn hálvur"
5 „Søtur er sjálvgivin biti"

1

At undrast og spyrja

Les yrkingina

- Skriva, millum annað við støði í yrkingini, tína hugsan um tað at spyrja og undrast – og um nakar munur er tí viðvíkjandi ímillum børn, ung og eldri ella gomul fólk

Far lítli útum

Far lítli útum eina løtu og spæl
og ver nú so fittur ein drongur.
Tí nógv er at spyrja um, tað veit eg væl,
men mað ikki abba tín longur!

Nei, spyr ikki abba, hví sólin er heit,
og ikki, hví mánin er hálvur.
Tí líka so lítið helst abbi tín veit
um tílíkt, sum hvat tú veitst sjálvur.

Og spyr ikki meira, um verðin er rund,
er tríkantað ella ein flata,
men bygg tær ein bátin og sigl yvir sund,
tú skalt av tær sjálvum tað fata.

Hví abbasa bein munnu vera so veik,
hví skeggið á høku man sita,
hví vangin er gráur, hví ryggurin sveik –
á, livir tú, fært tú at vita!

Hví fiskurin liva í havinum kann,
hví rytur í berginum karra,
hví vatnið er kalt, og hví eldurin brann –
ja, alt tað veit bara Várharra.

Finnbogi Ísakson (1943-2005)

2

Fjølmiðlar

- Hvørjum hyggur tú mest at í sjónvarpinum?
- Hvørjum lurtar tú mest eftir í útvarpinum?
- Ber saman hesar báðar fjølmiðlarnar



3

Ungdómur og sorg

Les tekstin

- Skriva, m.a. við støði í tekstinum niðanfyri, tína hugsan um sorg og ungdóm

Á Margarinfabrikkini ætla tey sær at hava fleiri fyrilestrar við evnum, ið hava týdning fyri tey ungu, og mikukvøldið var lagt til brots við Hera Joensen, presti, ið tosaði um ung og sorg.

Siri Hansen sigur, at evnið í fyrsta fyrilestrinum varð valt við tí í huga, at tað hevur samband við vanlukkuna um nýggjársmundið, tá ið tvey ungfólk lótu lív.

– Mong av okkara ungu eru nógv ávirkað og merkt av vanlukkuni, og vanlukkan hevur eisini havt nógv at siga í okkara gerandisdegi á Margarinfabrikkini. Tey ungu hava tosað um tað, og tey hava ikki rættiliga vitað, hvussu tey skulu bera seg at við hvøkkinum og sorgini, greiðir Siri frá.

Tí var tað sjálvsagt at byrja við evninum sorg. Siri heldur eisini, at tey ungu fingu nakað burturúr.

– Tað er gott fyri tey at hoyra, at tað, sum tey kenna, er í lagi. Tað er í lagi at syrgja, men tað er eisini í lagi at flenna viðhvørt, sjálvt um ein syrgir, heldur hon.

Hon sigur eisini, at tey ungu vóru ógviliga glað fyri tiltakið. Hóast tey kanska hava eitt sindur ilt við at seta orð á, so hava tey kortini virðing fyri tiltakinum, og sjálvt um tey kláraðu illa at sita still tann tíman, fyrilesturin vardi, so kenna tey á henda hátt, at tey verða tikin í álvara.

– Tað, at foreldur og vaksin eisini komu við, var ógviliga gott. Ofta hava tey ungu ilt við at tosa við vaksin, sum í teirra verð einki skilja. Men tá ið tey ungu hava verið saman við foreldrunum og lurtað eftir tí sama fyrilestrinum, tá er tað kanska lættari at fáa eina samrøðu í lag, tí at tá hava foreldrini betri hylling á, hvat ið veruliga rørir seg ímillum undómin og í lívinum hjá teimum ungu.

(Úr Sosialinum 28. januar 2005 – tillagaður tekstur)

4

„Har tú ikki er sjálvur, ert tú ikki meir enn hálvur”

Soleiðis sigur eitt føroyskt orðatak

- Skriva um evnið

„Har tú ikki er sjálvur, ert tú ikki meir enn hálvur”

5

„Søtur er sjálvgivin biti”

Soleiðis sigur eitt føroyskt orðatak

- Skriva um evnið

„Søtur er sjálvgivin biti”